**TIL SØLU**
Svart trummusett av slagnum Tama Rockstar DX verður hervið lýst til sølu. Settið hevur fimm trummur, tvær tammir, eina gólvtamm, eina fóttrummu og eina rútmutrummu. Fimm bekkarar fylgja við og stativ til allar. Eisini fylgja taskur við. Prísur er 16.000 kr. Um hetta hevur áhuga, so ring
*tlf. 315210 ella 258836*

**TIL SØLU**
1 ára gamal Fender klassiskur nylonstreingjaður guitari, við cutaway og aktivari innbygdari microfon og Hardcase tasku. Til sølu fyri einans 8.000 kr.
*hjalmar@kallnet.fo ella 222132*

## Út- & Sjónvarp

**DIGITALUR MÓTTAKARI**
Ein Samsung DSR 9000 digitalur móttakari v/ møguleika til 2 kort til sølu fyri 2.000,-
*Tlf. 226220*

**SJÓNVARP**
Eitt Samsung sjónvarp 28" til sølu vegna flyting.
*Tlf. 211848*

**TIL SØLU**
Trådløs Video transmitter, Thomson VS540. Kan også bruges til DVD, Parabol m.m.(ny). 850 kr.
*Tel. 320828*

**SKY DIGITAL**
SKY mótakari og kort, kann skaffast. Við SKY Digital kanst tú síggja til dømis SKY Sport, SKY Movies, SKY One og nógvar aðrar góðar kanalir.... e-maila og fá meira at vita.
*E-postur: jan@kallnet.fo*

## Ymiskt

**TIL SØLU**
Flippermaskine (Twilight Zone) til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 219869*

**FERÐAST SAMAN**
Til Keypmannahavnar mikud. 22. jan ella hósd. 23. jan. og heimaftur mikud. ella hósd. eina viku seinni.
*Tlf. 228611*

**HYGG HER**
Hevur tú hug at investera 1.500 kr. og harvið fáa møguleikar at vinna nógvar pengar. Avmarkað nøgd.
*Tlf. 506513*

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
Nýggj úthurð, terassu/altan, v/sprossarútum 200x100 til sølu.
*Tlf. 311612*

**BRÚKTAR PH-LAMPUR BÍLIGA TIL SØLU**
2 stk. PH 5 Lampur kr. 1.500,00 pr. stk. nýprísur kr. 3.731,00. 2 stk. PH 3-4 Lampur kr. 800,00 pr. stk nýprísur kr. 2.156,00.
*Tlf. 250436*

**ÍSLAND-FØROYAR!**
Kom við 12. Manni til Íslands 5.-8. juni. Kostn. 4.998 kr. Ring og hoyr meira.
*12. Maður, 213212, www.footballsupporters.fo*

**JØRÐ TIL SØLU**
2 gyllin av jørð eru til sølu í Gimburhaganum í Sandavági um hóskandi boð fæst.
*Ring 332834 eftir kl. 17*

**SONY ERICSSON**
fartelefon við farvum, bluetooth, infrarød, wap, talememo, spøl, mms, sms, e-mail, kalendara, møguleika til kamera o.s.v. Nýprísur: 5.500, nú: 3.000 kr.
*Tlf. 221514*

**GALLERÍ VÁGSBOTN**
Hevur stóra søluframsýning á Torginum í SMS 3. til og við 8. februar. Um nakar hevur gamlar lutir ella málningar at selja, so ring tlf. 314293
*Gallerí Vágsbotn*

**YNSKIST**
Restpartí av brotflísum og øðrum havaflísum - alt hevur áhgua.
*J. Andreasen, tlf. 251450*

**TIL SØLU**
Trýggjar úthurðar til sølu fyri 2.800 kr. stk.
*J. Andreasen, tlf. 251450*

**STEÐGA Á!**
O1.b í Hoydølum skipar fyri loppumarknaði 01. feb. Vit vilja gjarna taka ímóti tí, ið fyllir hús tygara óneyðuga nógv. Lutirnir kunnu latast inn millum kl. 16-20 í auluni í studentaskúlanum 31. jan.
*Tlf. 256479, 224655 og 222435*

**FILÉTERINGSMASK. TIL SØLU**
Baader 34. Sker fisk til max. lgd. 40 cm. Sild, seið, síl 60/min. til sølu fyri kr. 40.000.
*Tlf. 313484 og 318434*

**TIL SØLU**
Modelflogfar við øllum tilhoyri til sølu. Hevur flogið tvær ferðir og sær gott út. Alt riggar, sum tað skal. Kostnaður kr. 6.000,-
*Tlf. 22 68 80*

**TELEFONIR TIL SØLU**
3 B & O og 3 Kirk Classic telefonir, seljast bíliga.
*Tlf. 310901/210901*

**ÍS SKOYTUR**
brúktar, ynskjast til, keyps, helst stødd 37, 13 og 42.
*Tlf. 310423, Annika*

**ER TAÐ NAKAR**
sum kundi glett meg við at skaffa mær 1 fláan døgurðatallerk og 6 djúpar. Mynstrið eitur Isabella. Tað eru 3 mynstur á. Eitt er størri og 2 smærri. Rósurnar eru heilt ljósareyðar við ljósagrønum bløðum.
*Tlf. 361366*

**TIL SØLU**
TOTAL GYM 1000 1 ferð brúkt til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 264577*

**BINDIKLUBBASANGIR**
Í sambandi við stóra bindiklubbakvøldið í Vestmanna 15. febr. sóknast vit eftir góðum bindiklubbasangum. Um tú eigur so ring
*Tlf. 221577-ella 424192*

**VINDEYGA**
Óbrúkt vindeyga 140x145, úr Sipo-mahogny, til sølu fyri kr. 4.000. Nývirði kr. 5.200.
*Tlf. 314129 ella 216622*

**SKEIÐ Í YOGA**
Vikuskiftisskeið í Yoga verður hildið leygard. 08. februar og sunnud. 09. febr., 2 1/2 tíma hvønn dagin. Skeiðleiðarar eru yogalærarar frá Dansk Yogaforening. Upplýsing og tilmelding á
*Tlf. 212202*

**TIL SØLU**
6 automatiskar snellur eru at fáa fyri 1/2 prís. Brúktar á Norðhavinum eitt vár.
*Tlf. 452066 ella 217666*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
Eitt super gott og super bíligt 11/2 ára gamalt Minolta Dynax 500si, v/3500 xi blitzi, eini Tamron 28-300 mm. aspheriskari linsu og einum óbrúktum stativi til sølu. Nýprísur 13.500 kr. til sølu fyri einans 7100 kr.
*Tlf. 260590*

**TIL SØLU**
Eitt cremefarvað vask við borðplátu 137 x 61 cm til baðirúm. Ein uttandura toysnórur; ( kann klappast saman) óbrúktur. Ein Esso oljufýring. Alt selist bíliga.
*Áhugað kunnu ringja 455845*

**TRENINGSBONKUR**
Kettler treningsbonkur við vektum + 1 boksisekkur.
*Tlf. 455291 ella 215291*

**SPILDURNÝGGJ ÚTHURÐ**
hvít v/ síðupartí (vinstra inn) stødd 118 x 203 til sølu. Prísur 12.000 kr.
*Tlf. 333841- 220341*

**LAKERAÐ SVINGTRAPPA**
úr límtræi, í góðum standi, hálvt sving, 180 stig. Hædd 262 cm, breidd 80 cm, bíliga til sølu.
*Tlf. 318675*


LØGMÁLARÁÐIÐ

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki at byrja skjótast til ber.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at samskipa eftirkanningina av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini, at fyrireika kunngeringina av lógum og kunngerðum í Kunngerðablaðnum og at viðlíkahalda lógdátugrunnin. Starvið fevnir eisini um at hjálpa til við øðrum uppgávum í Løgmálaráðnum.

**Faklig førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál og duga at arbeiða við telduforritinum Word.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarflokki III.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hilmar Høgenni, deildarleiðara, tlf. 358080.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmálaráðnum**
**Postboks 159**
**FO-110 Tórshavn**

og skulu verða Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi hósdagin 30. januar 2003.

Løgmálaráðið er fyrisiting hjá landsstýrismanninum í løgmálum, ið somuleiðis er varaløgmaður, og sum eisini situr fyri kommunumálum og norðurlandamálum. Løgmálaráðið er skipað við tveimum deildum: Løgdeildin og Innanríkisdeildin.






LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Starvslesandi í Brússel

**(Stagiaire)**

Søkt verður eftir lesandi til sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel). Starvstíðin er frá mars 2003 til juli 2003 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni, serliga við atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á *bachelor* stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovan er skipanarliga samrunnin partar av Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Starvið er skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum og er ólønt; men viðbót verður latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðar-útreiðslur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf + 32 (2) 233 08 55.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv, c.v. og viðmæli verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
**Tinganesi**
**FO-100 Tórshavn**

*Telefax +298 35 10 15 * t-postur: info@tinganes.fo*

og skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi mikudagin 29. januar 2003.

***Løgmansskrivstovan** er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávikavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

<ph_1>




# HEILSANIR



**Góði Dánjal og Lea**
Hjartaliga tillukku við 1 og 7 ára føðingardøgunum 17. des. og 16. jan. Alt gott í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**



**Til tvíburðarnar úti á Bakka**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Jesus signi framtíð tykkara. P.s. á den deiliga sandkøka.
**Heilsan systkinabørnini**



**Góða Kristianna og Jógvan**
Lukku og gleði á tykkara fimti ára degi. Nógv góð ár í framtíðini.
**Bestu heilsanir Ja, giti nú**



**Góða Hildur**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum í dag. Alt tað besta
**Ynskja Sonjaomma og Óliabbi**



**Góða fitta mostir**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum í dag og alt tað besta
**Ynskja Steffan, Ronni og Teitur**



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 95 ára føðingardegnum 17. november 2002, takki eg hjartaliga. Somuleiðis ynski eg familju, vinum og kenningum eitt gott nýggjár.
**Kærar heilsanir**
**Karin Strøm, Trongisvágur**



**Hey Elsa Maria**
Tillukku við 9 ára degnum 14. januar. Vit elska teg. Heilsa øllum í húsinum. Tillukku við lítlabeiggja.
**Heilsan**
**omma og abbi í Esbjerg**





**Góðu, fittu Rakur og Turið**
Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við 2 og 7 ára føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Guðrum, mamma og babba**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum við gávum, telegrammum og á annan hátt gjørdu konfirmatiónsdag mín 13. oktober 2002 ógloymandi
**Heðin Stenberg, Argir**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: ..................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«